


# Japanskur ráðharri vitjar: Oljuleiting eisini umrødd

Deil:



**Jan Müller**

10.08.2014 - 11:09

Oljan.fo

Føroyska oljuvinnan og leitingin á landgrunninum vóru eisini umrødd, tá Johan Dahl, landsstýrismaður í farnu viku hevði høvi at hitta japanska varainnanríkisráðharran, sum vitjaði í Tinganesi.

"Eg nevndi føroyska landgrunnin og møguleikarnar her fyri honum, og at vit fegin eisini sóu feløg úr Japan virkin á okkara leiðum." Bæði almenn og privat oljufeløg í Asia harímillum japonsk eru farin at vísa nýggjum oljuleiðum eitt nú í Norðureuropa ans og taka alsamt meira lut í leitingini. Johan Dahl sigur við oljan.fo, at tað frá føroyskari síðu verður arbeitt meira miðvíst við at skapa áhuga fyri leitingini á landgrunninum millum altjóða oljufeløg, og her teljast eisini tey japonsku.

Japanski ráðharrin, sum vitjaði í farnu viku, hevur bjóðað føroyingum til Japan í sambandi við umrøðu av vinnuligum møguleikum og samstarvi landanna millum og hevur sambært Johan Dahl lovað at gera sítt til, at vit koma í samband við áhugaverd feløg í Japan bæði innan oljuvinnu og handilssambond annars.

Undir vitjanini, har Kaj Leo Johannessen, løgmaður eisini tók ímóti gestunum, varð avtalað, at bæði londini gera yvirlit yvir, hvørji evni føroyingar og japanarar kunnu og hava áhuga í at samstarva um og keypa og selja landanna millum.

Japonsk oljufeløg sum so Cieco og Idemitsu hava áður verið partur av leitingini á Atlantsmótinum, millum Føroyar og Hetland.

Japan, sum ikki sjálvt hevur atgongd til olju og gass í tess egna landi ger tí nógv burtur úr at útvega sær olju og gass úr øðrum londum umframt sjálvt at taka lut í bæði oljuleiting og –framleiðslu langt heimanífrá.

Japan telist eisini millum tey londini í Asia, sum ynskir at fáa ein leiklut í Arktis, ið Føroyar eru partur av.



